# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg vóni, at fleiri fara at koma um markið, og at tann gula marknastrokan verður turkað burtur*

*(Roh Moo-hyun)*

# Ein søguligur fundur

**Tað var ein søgulig hending, tá norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-Il, tók ímóti suðurkoreanska forsetanum, Roh Moo-hyun, í morgun**



*Ein søgulig hending, tá Kim Jong-Il og Roh Moo-hyun tóku í hondina á hvør øðrum í morgun*

Fleiri túsund fólk vóru komin saman í norðurkoreanska høvuðsstaðnum Pyongyang at taka ímóti suðurkoreanska forsetanum.

- Okkara pínufulla søga hevur mint okkum á, hvussu týðandi friður er. Tíðin er komin, til at Suður og Norður taka í hondina á hvør øðrum og fara undir eina nýggja friðarsøgu, segði Roh Moo-hyun, tá hann kom til Pyongyang.

Stutt frammanundan var hann farin norður um markið millum tey bæði londini. Hann gekk um markið, og hetta var fyrstu ferð, at ein suðurkoreanskur leiðari hevur gingið tvørtur um markið. Á markinum er ein gul strika, og tá Roh og kona hansara, Kwon Yang-sook, stigu yvir um strikuna, tóku norðurkoreanskir embætismenn ímóti teimum. Saman við embætismonnunum vóru norðurkoreanskar kvinnur í tjóðarbúna.

- Eg vóni, at fleiri fara at ganga tvørtur um markið sum eg. Hendan strikan verður turkað burtur, og múrurin fer at fella, segði suðurkoreanski forsetin, tá hann var komin norðurum.

Vitjanin hjá suðurkoreanska forsetanum í Pyongyang varir til hósdagin, og hesar dagarnar skulu hann og embætismenn hansara tosa við teir norðurkoreonsku leiðararnar um búskaparligt samstarv tvørtur um markið. Hetta er aðru ferð, at ein suðurkoreanskur forseti vitjar Norðurkorea. Fyrru ferð var í 2000.

# Flogferðafólk í Evropa skulu skrásetast

**ES ætlar at gera tað trupult hjá yvirgangsmonnum at ferðast við flogfari**

USA og Kanada hava longu sett í gildi reglur um at skráseta fólk, sum ferðast við flogfari, og nú ætla ES-londini at gera tað sama.

Á fundi millum løgmálaráðharrarnar í ES-londunum hevur Franco Frattini, kommiserur í løgfrøðimálum, skotið upp, at ES skal áleggja hvørjum einstøkum landi at skráseta fólk, sum ferðast við flogfari. Endamálið er at forða yvirgangsmonnum at ferðast millum lond ella at søkja at ferðamannaflogførum.

Danska stjórnin tekur undir við hugskotinum. Lene Espersen, løgmálaráðharri, hevur tó sagt, at tað er ikki vist, at Danmark fer at taka undir við einari so víðgongdari skrásetingarskipan sum teirri í USA. Millum annað skal støða takast til, hvørjar upplýsingar kunnu skrásetast, hvussu tær skulu goymast og hvussu leingi.




*Um stutta tíð verða tey, sum ferðast um flogvøllin í Kastrup, skrásett*

**STUTT SAGT**

## Munkar í fongsul

Sambært bretska kringvarpinum BBC hava myndugleikarnir í Myanmar savnað einar 4.000 munkar á einum tekniskum skúla og aðrastaðni. Alment bleiv hetta gjørt fyri at forða munkunum at taka lut í mótmælisgongum, men keldurnar hjá BBC vilja vera við, at munkarnir skulu flytast til nøkur fongsul longri norðuri í landinum. Aðrar keldur hava ikki váttað tíðindini.

## Bush boðin til Iran

Lærdi háskúlin í iranska býnum Mashhad hevur boðið amerikanska forsetanum, George W. Bush, at vitja skúlan og at skifta orð við tey lesandi um ymisk politisk mál. Innbjóðingin er komin bara nakrar dagar, eftir at iranski frorsetin, Mahmoud Ahmadinejad, vitjaði Columbia University í New York, har hann svaraði spurningum um ymisk viðurskifti. Iranskir fjølmiðlar hava gjørt nógv burturúr, at Ahmadinejad fekk eina heldur kaldliga móttøku í New York, og at hann millum annað bleiv umrøddur sum ein óndur einaræðisharri.

## Óruddiligt í rúmdini

Tað byrjaði fyri 50 árum síðani, tá russar sendu sín fyrsta Sputnik út í rúmdina. Síðani hava amerikanararnir verið á Mánanum, og fleiri størri og smærri før eru send langan veg til Mars og aðrar gongustjørnur. Harafturat er eitt ótal av fylgisveinum á ringferð um Jørðina. Men tað stóra virksemið í rúmdini hevur sín prís. Danski rúmdargranskarin Flemming Hansen er komin eftir, at fleiri milliónir mannaskaptir lutir ferðast kring Jørðina í hesi løtu. Av teimum eru umleið 12.000 størri enn 10 centimetrar.